FISKIVINNUTÍÐINDI

## Bátarnir inni vegna veður

Tað hevur viðrað illa um vikuskiftið og stórir partar av flotanum hava ligið inni. Fleiri skip lógu á Havnini í gjar. Hann sigur framvegis frá frískum vindi. Várróðurin er um at vera av, fiskurin er liðugur at gýta og fyri framman liggur summarróðurin. Prísurin á toski er eisini fallandi. Fríggjadagin kom prísurin á hýsu upp um toskaprísin. Men prísurin á toski er framvegis høgur. Prísurin á toski 1 er omanfyri kr. 15.00.

## Beta byggir í Spania

Fríggjadagin vóru tíðindini, sum leingi hava gingið, at Beta fer at byggja tveir nýggjar trolarar, váttaði.

Talan er um skip á líknandi stødd og við líknandi motororku sum teir gomlu Kubatrolararnir. Tey eru tó eitt sindur breiðari og taka 1000 kassar ella 100.000 pund meira. Kubatrolararnir taka 2500 kassar.

Beta skal lata trý fiskiloyvi fyri at fáa báðar trolararnar inn í landi-. Beta hevur í boðið at fáa eitt par afturat, men teir vilja fyrst royna nýggja parið, áðrenn støða verður tikið til hetta.

Føroya Banki fíggjar meginpartin av skipinum.

## Enniberg klárur til nýggjan túr

Sunnudagin kom Enniberg aftur á Havnina. Enniberg hevur verið í Grimsby og selt veiðuna, 500 tons í flaki, sum teir hava veitt í norska partinum av Barentshavinum.

Enniberg fer nú á kongafiskaveiðu í Irmingarhavinum. Kvotan er uppi í norska partinum av Barentshavinum og ikki nyttar at fara í russinskan sjógv fyrr enn í fyrsta lagi í juni.

## Fiskasentralurin søga

Tað eru nú fleiri ár síðan at gamli fiskacentralurin á Vestaru Bryggju í Hvn lat aftur og bygningrnir hava staðið tómir. Men nú fara hesir eisini í søguna. Tórshavnar Skipasmiðja skal nýta økið til eina smiðju, sum skal taka sær av vanligum reperatiónsarbeiði umborð á skipum og tí verða bygningarnir niðurtiknir.

## Lemmatrolarar vilja hava fiskidagar

Lemmatrolararnir ella djúpvatnstrolararnir, sum vit vanliga kalla teir eru sera misnøgdir við skipanina teir arbeiða undir, har teirra veiða eftir upsa og blálongu verður stýrd at eini hjáveiðukvotu av toski. Teir vilja nú hava fiskidagar eins og restin av flotanum.

Fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen er nú farin undir at fáa hjáveiðukvotuna broytta til fiskidagar. Hann segði við Dagblaðið í seinastu útgávuni.

-Vinnan skal hava tryggar karmar at arbeiða undir. Lemmatrolararnir hava verið undir einari fyribilsskipan upp á hálvt ár í senn seinastu 4-5 árini, og tað ber ikki til, sigur fiskimálaráðharrin.

# Yvirmenn vóru óansnir

Danskar kanningar vísa, at yvirmenninir á danska nótabátinum "Gitte Henning vóru óansnir, tá teir sigldu á Høgnaboga beint eftir midnátt 26 juni í fjør, veit útvarpið at siga.

"Gitte Henning" var ávegis av Havnini til Fuglafjarðar, tá óhappið hendið. Hol kom á skipið, men teir megnaðu sjálvir at sigla á Fuglafjørð.

Høgnaboði liggur út fyri Rituvík og er merktur í sjókortum.

# Eru farnir at taka ILA raktan laks

12.000 laksar um dagin. So nógvir laksar verða í løtuni tiknir úr ringunum í Oyndarfirði. ILA sjúkan er staðfest á Oyndarfirði og allur fiskurin skal takast. Tað verður ein løta, tí 1,2 milliónir laksar ganga í ringunum í Oyndarfirði.

ILA sjúkan var í 1999 staðfest á Fuglafirði og fyri stuttum var hon eisini staðfest á Oyndarfirði. Tað er Vestlaks, sum eigur ringarnar í Oyndarfirði.

Tað er ilt at siga, hvussu smittan verður borðin víðar. Tætt er millum Oyndarfjørð og Fuglafjørð og streymur er. Eisini kann seiður fáa smittuna, og smittan kann vera borin við honum.

# Onki veð í fiskirættindum



Føroya Banki ynskir at fáa veð í fiskirættindunum hjá skipum og teir duga ikki at síggja nakra fíggjarliga grundgeving fyri at hetta ikki kann henda. Men landsstýrið er ikki samt í hesum.

- Lógin um vinnuliga fiskiskap sigur greitt at tilfeingið undir Føroyum er fólksins ogn og vit fara ikki at geva hesi rættindi víðari, segði Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiski vinnumálum við útvarpið hóskvøldið, leysliga endurgivið eftir minninum.

# Sparikassin fíggjar helvtina av alivinnuni

Sparikassin er rættuliga komin við í føroyskt vinnulív. Í dag fíggjar sparikassin umleið helvtina av føroysku alivinnuni og hendan stendur fyri einum rættuliga stórum parti av samlaða føroyska fiskiútflutninginum.

Leiklutirin hjá Føroya Sparikassa í alivinnuni gevur pening, tí alivinnan stóð seg sera væl í fjør. Prísirnir vóru góðir og tí varð alifiskurin tikin so skjótt sum gjørligt. Hetta hevur viðført, at fiskurin í meðal var yngri, tá hann varð tikin, og tí var meðalvektin eisini minni, og hetta sæst aftur í útflutninginum. Skiftisavlopið er sostatt økt munandi, og hóast prísirnir fullu aftur síðslu mánaðirnar í 2000, hjevði alivinnan sum heilt stórt yvirskot í fjør, sigur Føroya Sparikassi

## Gólvsølan 2. apríl

| Sýslu-nummar | Skipanavn | reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 102 | Bylgjan | snella | 133 |
| FD 222 | Gamli edvard | snella | 223 |
| FD 363 | Knúkur | snella | 73 |
| FD 492 | Klettur | lína | 35 |
| FD1119 | Fjalllambið | snella | 44 |
| KG 279 | Norðberg | lína | 5.648 |
| TG 56 | Marian m. | snella | 235 |
| VA 214 | Vesturvarði | botntrol | 559 |
| VA 215 | Akraborg | partrol | 274 |
| VA 216 | Varðborg | partrol | 107 |



## Góði Jan

Ja mín sann

tá nornan spann

tú orðið vann;

Kom bara an

rg verja kann

konu og mann

- í tær

vin eg fann.

**Erling Simonsen**

## Laksakanningar norðan fyri Føroyar

FYRILESTUR

Hóskvøldið kl 20 verður almennur fyrilestur á Fiskirannsóknarstovuni. Tað er Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, dr. scient., sum heldur fyrilesturin ið hann kallar Laksakanningar norðan fyri Føroyar.

Jan Arge Jacobsen starvast sum fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni við ábyrgd av uppsjóvarfiski, so sum sild, svartkjafti, makreli og laksi. Í mai 2000 vardi hann doktararitgerð um laksakanningar norðan fyri Føroyar. Í fyrilestrinum verður greitt frá høvuðsúrslitunum úr doktararitgerðini.

Havøkið norðan fyri Føroyar er týdningarmikið føði- og uppvakstrarøki hjá laksi, tá hann er farin úr áunum út á hav. Laksaverkætlanin hevði sum endamál at læra meir um leiklutin hjá laksi í hesi vistfrøðiligu skipan. Greitt verður frá, hvaðani laksurin stavar, ið gongur á beiti norðanfyri um heystið og veturin. Alilaksur, ið onkursvegna er sloppin úr alibrúkum, er at finna millum villa laksin í sjónum. Kannað er, hvussu hesin laksur klárar seg millum villa laksin á víðum havi. Ferðast hann, og etur hann á sama hátt sum hin villi laksurin? Laksalús er eisini at finna á laksi á opnum havi, og kannað er, um alilaksurin er meira fongdur við lús enn villi laksurin.

Sí eisini heimasíðuna www.setur.fo/almen.html.

# 405 handverkarar fingu frádrátt



**Er ein handvarkari uttanlands í 30 dagar, verður skattskylduga inntøkan hjá honum lækkað við kr. 10.000,-, skrivar Vinnuhúsið**

Vinnuhúsið skrivar, at í dag eru eini 2200 størv innan bygging og skipasmiðjursmiðjur. Í seinnu helvt av 80'unum vóru eini 3000 til 3400 størv. Størvini fækkað í stórum í kreppuárunum og eru komin niður á 1156 í 1994, tá ið talið var uppá tað lægsta. Størvini eru so líðandi vorðin fleiri í tali og vóru í 2000 umleið 2200 størv.

Eitt ávíst fyrivarni skal takast við tølunum. Til dømis eru løntakarar, sum hava 2 størv, skrásettir 2 ferðir. Men felagið hevur valt at brúka november fyri at fáa eina so greiða mynd sum møguligt. Í november mánað er ikki nógv av frítíðaravloysarar og øðrum líknandi størvum.

Fleiri entreprenørar vísa í dag á, at tað er trupult at fáa handverkarar.

### Arbeiðsloysið

Í desember 1999 var arbeiðsloysið 5%. Talið fevnir um tøk í Arbeiðsloysisskipanini, undantikin tey sum eru í Fiskavirkisskipanini, og arbeiðsleys, sum fáa stuðul frá Almannastovuni.

Í desember 2000 var arbeiðsloysið 4%, sum má sigast at vera sera lágt. Uppá fyrispurning sigur ALS, at tað tann 2. mars 2001 vóru 36 handverkarar arbeiðsleysir innanfyri økið hjá FHMF. Í fleiri førum snýr tað seg um ein einstakan arbeiðsleysan innanfyri hvørt fak. Støðan gerst ikki betri av handverkarafrádráttinum.

### Frádrátturin

Handverkarafrádrátturin merkir, at handverkarar, sum arbeiða uttanlands, fáa ein skattafrádrátt á kr. 300,- um dagin, um handverkarin rindar allar útreiðslur av uttanlandsuppihaldinum sjálvur. Hetta merkir, at skattskylduga inntøkan verður lækkað við kr. 300,- um dagin. Er ein handverkari uttanlanda í 30 dagar, verður skattskylduga inntøkan hjá honum lækkað við kr. 10.000,-.

Tjenar ein handverkari til dømis kr. 60.000,- uppá 3 mánaðir uttanlanda, rindar hann, um skatturin er 50%, við handverkarafrádráttinum kr. 15.000,- í skatt, meðan hann uttan frádráttin hevði rindað kr. 30.000,-.

Tølini fyri 2000 eru ikki gjørd upp enn, men tølini fyri 1999 vísa, at íalt fingu 405 handverkarar henda frádrátt – tilsamans ein upphædd á kr. 15.122.547,-.

Handverkarafrádrátturin í 1999 var kr. 600,-, skrivar Vinnuhúsið.

# Sálarheilsudagurin hildin í Føroyum

TÍÐINDASKRIV

*Sinnisbati*

Felagið Sinnisbati skipar fyri umfatandi tiltøkum í sambandi við at alheimsheilsustovnurin hjá Sameindu tjóðunum hevur kosið ár 2001 til altjóða sálarheilsuár. 7. apríl verður ein serstakur dagur í hesum sambandi kring allan heim, og eisini her í Føroyum. Men flestu kvøldini í vikuni verða serstøk tiltøk við m.a. fyrlestrum í útvarpshøllini og læraraskúlahøllini.

Lagt er upp til eina sera spennandi og viðkomandi skrá komandi vikuna.

Í samband við altjóða sálarheilsuárið hevur felagið Sinnisbati saman við psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum hevur tikið stig til at kasta ljóskastaran á støðu teirra sálarsjúku her í Føroyum.

Eitt stórt og umfatandi fyrireikingararbeiði er gjørt við at leggja til rættis eina sera fjølbroytta skrá í døgunum 2-7. apríl í útvarpshøllini og læraraskúlahøllini.

Útvarpshøllin karmur um fjølbroytt tiltøk

Í gjárkvøldið, mánakvøldið 2. apríl, kl. 19.30, byrjaði tiltakið í itróttarhøllini, har Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata bar fram stutta røðu. Síðani talaði Sofus Joensen, psykiatriskur yvirlækni, um »Depressión«.

Bergur Gotfred, lærari og virkisráðgevi hugleiddi síðani um evnið »Samskifti og lívskvalitet«

Í kvøld, týskvøldið, fer Eyðun Joensen, sálarfrøðingur at greiða frá psykiatrisøguni í Føroyum og Vilgerð Astridardóttir fer at tala um "Demens".

Mikukvøldið 4. apríl greiðir Frans Róin, lækni frá um Skizofreni og Carl A. Arge fer at tala um evnið "Brúk/misbrúk av alkoholi og rúsevnum"

Hóskvøldið 5. apríl fer Heri Kragesten, psykologur at tala um "angist" og Arne Ludvig, psykologur fer at hugleiða um evni: "Samfelagið/barna- og ungdómseyðkenni.".

Landsstýrismaðurin í heilsumálum setur altjóðaheilsudagin 7. apríl í Læraraskúlahøllini

Leygarkvøldið 7. apríl, kl. 19.30 verður sjálvur altjóða sálarheilsudagurin hildin við kvøldsetu í læraraskúlahøllini.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Sámal Petur í Grund, byrjar kvøldsetuna við flyta fram stutta røðu.

Síðani fer Tórmóð Stórá at hugleiða um "framtíðarvisiónirnar viðvíkjandi psykiatri í Føroyum."

Jóhannes Andreasen fer at spæla klassisk stykki og eisini verða brot úr "várskemt". Maria Andersen syngur og Kórsangur verður við Cantabile, Eysturstrætiband spælir, yrkingar verða lisnar og Hanus Johansen syngur

Meðan steðgurin er verður møguligt at keypa bøkur og fáa ein drekkamunn. Kostnaður fyri vaksin: Kr.50,-

Frásøgufólk verða Hilmar Jan Hansen og Jákup Magnussen.